LM-070/2023

Aud í Soylu

Fylgiskjal 4

Fra: Dátueftirlitið
Sendt: 28. november 2023 14:27
Til: Aud í Soylu; Birita Ludvíksdóttir
Cc: Majken Hammer
Emne: RE: TIL UMMÆLIS: Nýggj hoyring viðv. lógaruppskoti um ílegulóg II

Góðu tit

Dátueftirlitið hevur sum kunnugt verið við í serfrøðingabólkinum, og tí í ein ávísan mun verið við í arbeiðinum at gera løgtingslógaruppskotið. Dátueftirlitið metir, at uppskotið hevur tikið hædd fyri sjónarmiðunum hjá Dátueftirlitinum, og at tann parturin, ið snýr seg um dátuverndarlógina og viðgerð av persónupplýsingum er væl lýstur í viðmerkingunum.

Dátueftirlitið hevur tí ikki aðrar viðmerkingar til løgtingslógaruppskotið.

Vinarliga

Tóri Højgaard
Stjóri

Dátueftirlitið

Postboks 300
FO-110 Tórshavn

Telefon: +298 30 91 00
Beinleiðis: +298 29 91 00
Teldupostur: dat@dat.fo
Heimasíða: www.dat.fo

Øll málsviðgerð á Dátueftirlitinum er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.

From: Aud í Soylu <aud.soylu@hmr.fo>
Sent: týsdagur, 14. november 2023 15:06
To: Fólkaheilsustýrið <hst@hst.fo>; Bjarni á Steig <bjarni@hst.fo>; setur@setur.fo; Vísindasiðsemisnevndin <vsn@vsn.fo>; Gunnhild Helmsdal <gunnhildh@kl.fo>; ghelmsdal@hotmail.com; Etiskaradid <er@er.fo>; djo@olivant.fo; Granskingarráðið <Gransking@gransking.fo>; Heilsutrygd <heilsutrygd@heilsutrygd.fo>; Egil á Bø <eab@heilsutrygd.fo>; Landsapotekarin <landsapotekarin@apotek.fo>; Hjalti Gunnarstein <hjalti.gunnarstein@apotek.fo>; Pál Weihe <pal@health.fo>; 'janra@ls.fo' <janra@ls.fo>; 'm-dam@olivant.fo' <m-dam@olivant.fo>; 'Marjus Dam' <marjusdam@gmail.com>; 'info@sjukrarokt.fo' <info@sjukrarokt.fo>; Bioanalytikarafelagið <bio@olivant.fo>; 'etf@etf.fo' <etf@etf.fo>; Fysioterapeutfelagið <fys@fys.fo>; odont@odont.biz; Heilsurøktarafelagið <heilsurokt@hrf.fo>; Annika Hoydal <ljm.foroya@gmail.com>; trf@olivant.fo; anrub@hotmail.com; megd@megd.fo; Krabbameinsfelagið (kmf@krabbamein.fo) <kmf@krabbamein.fo>; javni@javni.fo; lp@eldri.fo; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; politi@politi.fo
Subject: TIL UMMÆLIS: Nýggj hoyring viðv. lógaruppskoti um ílegulóg II

Nýggj hoyring viðv. lógaruppskoti til ílegulóg II

Hjálagda lógaruppskot um vevnaðarskrá, genomskrá, diagnosuskrá og ættarbandsskrá til gransking í mannaílegum og persónlagað medisin (Ílegulógin II) varð sent tykkum til hoyringar í juni 2023.

Av tí, at broytingar eru gjørdar í lógaruppskotinum, verður lógaruppskotið sent aftur til stutta hoyring hjá hoyringspørtunum.

Í hesum lógaruppskoti verður skotið upp, at heitið: "Fólkaheilsustýrið" verður broytt til "Heilsustýrið".

Hoyringsfreist
Møgulig hoyringssvar skulu sendast Heilsumálaráðnum **í seinasta lagi 28. november 2023,** umvegis: hmr@hmr.fo við avriti til Biritu Ludvíksdóttir, forkvinna í arbeiðsbólkinum og ráðgevi í Heilsumálaráðnum: birita.ludviksdottir@hmr.fo

Um tit ynskja at halda fast við fyrra hoyringssvar tykkara til hetta lógaruppskot, kunnu tit boða Heilsumálaráðnum frá hesum í seinasta lagi 28. november 2023.

Vinaliga

f. Biritu Ludvíksdóttir, forkvinna í arbeiðsbólkinum og ráðgevi í Heilsumálaráðnum

/Aud í Soylu
Samskipari

Heilsumálaráðið/Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734004
aud.soylu@hmr.fo • **www.hmr.fo**